Spæl 24
V/NS

| | | |
|---|---|---|
| | ♠ T 8 6 4<br>♥ 9 8 2<br>♦ 9 4<br>♣ 9 7 4 3 | |
| ♠ A 9 7 2<br>♥ K T 3<br>♦ 7 6<br>♣ K J T 2 | N<br>V E<br>S | ♠ J<br>♥ Q 7 6<br>♦ A K Q J T 5<br>♣ A Q 8 |
| | ♠ K Q 5 3<br>♥ A J 5 4<br>♦ 8 3 2<br>♣ 6 5 | |

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Egil Sondum | Kauko Koistinen | Jóannes Mouritsen | Seppo Niemi |
| pass | pass | 1♦ | pass |
| 1♠ | pass | 3ut | pass |
| 4ut | pass | 6♦ | pass |
| pass | pass | | |

Útspæl: ♠K

Eftir avtalunum hjá teimum báðum lovar springmeldið til 3ut ein gangandi rútaralit og singleton ella renons í litinum hjá makkaranum. Slemmurin varð meldaður við tey flestu borðini, eisini finnarnir í hinum rúminum komu í hann.
Hesin seinni dysturin móti finnum var sera spennandi at fylgja við í, tí leingi sá tað út sum, at vit skuldu fáa annan sigurin í kappingini. Eftir seks tey fyrstu spølini vóru vit á odda við 36-7 impum. Men sum dysturin leið, fóru finnar framum og vunnu at enda dystin 48-37, sum eftir tí gamla 25-0 stiganum hevði givið 17-13. Eftir tí nýggja 20-0 stiganum gjørdist úrslitið sigur til Finland 13,04 - 6,96.